# Blaðfólk

Á høvuðsredaktión okkara á Argjum er eitt spennandi, avbjóðandi og fjøllbroytt starv sum blaðfólk leyst.

Starvið fevnir fyrst og fremst um at røkja uppgávur á høvuðsredaktiónini, men møguleiki er tó eisini fyri uppgávum kring landið, har vit hava lokalredaktiónir í Klaksvík, Sandavági, Sandvík og við Saltangará.

Vit hugsa okkum, at tú skalt byrja í starvinum 1. februar komandi, men er tað ynskiligt, er møguleiki eisini at byrja fyri hetta.

Vit rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært sáttmála millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller á telefon 341 800. Ella á teldupostadressuni, jan@sosialurin.fo.

Seinasta freist at søkja starvið er mánadagin, 19. januar, og skulu umsóknir við viðkomandi upplýsingum sendast til:

**Sosialurin**
Jan Müller
Postsmoga 76
100 Tórshavn

Sosialurin

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið.
Á Sosialinum starvast í dag umleið 30 fólk.





# Endurnýtslan letur upp
## mánamorgun 12/1 kl. 10

**Nýggj tænasta**
Endurnýtslan á Hjalla er ein nýggj tænasta til borgarar í Tórshavnar kommunu. Her ber til at lata inn alt burturkast, ið ikki verður heintað við bústaðin.

Á plássinum eru bingjur til tað skilda burturkastið. Tú kanst koyra inn á plássið við bili. Gjølla er merkt upp, so lætt er at finna røttu bingjuna. Tú kanst stilla bilin við hvørja einstaka bingju og avskipa.

Til tess at minka um bíðirøðina á Endurnýtsluni eigur tú at skilja burturkastið heima. Á Endurnýtsluni, á www.torshavn.fo og á Snarskivuni kanst tú fáa eina vegleiðing, ið vísur, hvussu tú skalt skilja burturkastið.

Útbúgvin starvsfólk eru á plássinum. Tað er umráðandi, at vegleiðingar frá teimum verða fylgdar.

Tá ið tú letur vandamikið burturkast inn, skalt tú altíð seta teg í samband við eitt starvsfólk.

**Upplatingartíðir**
Endurnýtslan er opin soleiðis:

Mánadag - mikudag: 8 - 17
Hósdag: 8 - 20
Fríggjadag: 8 - 17
Leygardag: 13 - 17

REPROZ

Endurnýtslan
Tel 30 20 10 · www.torshavn.fo



# Starvslýsingar á www.portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo



Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo


# Kunngerð
## um løgtingsval í Fuglafjarðar kommunu

Til veljarar til løgtingsvalið 20. januar 2004 í Fuglafjarðar kommunu.

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at atkvøðugreiðslan fer fram í **býráðssalinum** týsdagin 20. januar 2004 fyri Fuglafjørð og Kambsdal og í húsunum hjá **Annu Jensen** fyri Hellurnar.

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 og heldur fram til kl. 20.00 ella so leingi veljarar møta uttan støðg.

Veljarar, ið sambært vallógini hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð mánadag til og við fríggjadag millum kl. 10.00 og 15.00.

Tey, ið vegna sjúku ikki kunnu koma á valstøðini, kunnu velja heima við at venda sær til býráðsskrivstovuna á telefon 444006 innan kl. 15.00 tann 19. januar 2004.

Seinasti dagur fyri at greiða brævatkvøðu er **mánadagur tann 19. januar 2004**.

Fuglafjørður, tann 5. januar 2004
**Fuglafjarðar býráð**

Sosialurin -tað loysir seg



# Symfoniorkestrið við spennandi solistum



*Føroya symfoniorkestur fer aftur at spæla fyri einum væntandi fullsettum sali í Norðurlandahúsinum sunnudagin 11. januar.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Føroya symfoniorkestur og stóri valfundurin eru stóru tiltøkini hjá Norðurlandahúsinum í næstum**

TILTØK
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Næstu vikuna verður rættiliga hendingarrík hjá Norðurlandahúsinum. Føroya Symfoniorksestur skipað fyri árligu nýggjárskonsertini sunnudagin 11. januar, men eisini valstríðið fer at merkjast í Norðurlandahúsinum.

Men tað slepst ikki undan, at hóast val er í hond, so gleða nógv fólk seg til nýggjárskonsertina, sum er eitt av teimum væl umtóktu afturvendandi tiltøkunum hjá Norrðurlandahúsinum.

Umframt at savna eina ørgrynnu av hyggjarum og lurtarum kring landið, plaga vanliga nógv fólk eisini at koma til konsertirnar. So nógv, at fyrireikarnir mugu seta tvær konsertir á skránna. Hesar verða kl. 16 og 19 sunnudagin 11. januar.

Tað verður Martin Mouritsen, sum stjórnar Føroya Symfoniorkesturi. Solistar eru Nikolaos Kapnas, violin, Nina Pavlosky, sopran, og Niels Jørgen Riis, tenor.

Eisini luttekur Tórshavnar Manskór hjá Bjarna Restorff.

13 verk eru á skránni hjá symfoniorkestrinum og manskórinum.

## Valstríð og Kielarfriður

Mikudagin 14. januar kl. 19.30 hýsir Norðurlandahúsið Norrøna felagnum. Evni á fundinum hjá felagnum mikukvøldið er Kielarfriðurin. Mikudagin eru 190 ár síðani, at kielarfriðurin varð staðfestur hin 14. januar 1814. Hesin sáttmáli varð gjørdur millum Danmark-Noreg og Eysturríki og onnur stórveldi. Sáttmálin segði, at Danmark skuldi lata Noreg til Svøríki, Stórabretland fær Helgoland, meðan Danmark fær svenska Pommern við Rugen. Noreg góðkendi ikki Kielarfriðin, men stovanði eitt sjálvstøðugt ríki 17. mai 1814.

Tað verður Zakarias Wang, sum fer at halda fyrilesturin í Norðurlandahúsinum mikukvøldið.

Stóri valfundurin, sum fólk eru vorðin von við seinnu árini í Norðurlandahúsinum, verður sunnudagin 18. januar kl. 19. Hesin fundurin verður sum undanfarin ár sendur beinleiðis í sjónvarpi og útvarpi. Fundurin savnar vanliga nógv fólk, og hann fáa stóra ávirkan á valúrslitið tveir dagar seinni.

## 21. árið á rað

17. januar letur ein listaframsýning upp í Norðurlandahúsinum. Heitið er »Skibet er ladet med...«. Listafólkini eru úr Suðurjútlandi og Suðurslesvik. Tey trý listafólkini, Nis Vollertsen, Viggo Bõhrnsen-Jensen og Bente Sonne til staðar.

Tað er Norðurlendska kunningarstovan í Suðurjútlandi, sum hevur fingið sambandið í lag, og ætlanin við ferðandi framsýningini er at víðka um tey góðu mentanarligu sambond, sum longu eru millum Suðurjútland/Suðurslesvik, Føroyar og Ísland, har framsýningn verður sýnd seinni, siga fyrireikarnir.

Barnadansurin hevur verið eitt fast punkt á skránni hjá Norðurlandahúsinum í samfull 21 ár. Hetta er tískil drúgvasta tiltakið í søguni hjá Norðurlandahúsinum.

Dansað verður hvørt fríggjakvøld kl. 20. Tað er Norðurlandahúsið og dansifelagið í Havn, sum skipað fyri. Endamálið er at kveikja áhuga og at læra børnini um føroyska dansin.







**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 10.01. kl. $20^{45}$
Leygardagin 10.01. kl. $23^{45}$
Sunnudagin 11.01. kl. $20^{45}$
Sunnudagin 11.01. kl. $22^{15}$




Leygardagin 10.01. kl. $21^{45}$
Leygardagin 10.01. kl. $23^{15}$
Sunnudagin 11.01. kl. $18^{45}$




Leygardagin 10.01. kl. $17^{30}$
Sunnudagin 11.01. kl. $18^{00}$




Leygardagin 10.01. kl. $18^{00}$
Sunnudagin 11.01. kl. $23^{15}$

**BIO KIOSKIN**
**Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.**